gult cyan magenta svart



ÚT AT KOYRA

# Hyundai Elantra

## – *nútímans og klassiskt design*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




Hyundai Elantra, ið nú er komin á marknaðin, ein nýggjur bilur frá innast til uttast. Modellið er bæði nútímans og klassiskt, eins og nógv er gjørt burturúr at bilurin skal vera rúmligur.

### Satsa uppá Evropa

Hyundai verksmiðjan í Suðurkorea er ein av heimsins størstu. Í 1998 keyptu teir Kia bilverksmiðjuna og framleiddu teir tilsamans yvir 2.8 milliónir bilar í fjør. Nú teir hava tikið eina stóra miðstøð í brúk í Frankfurt, er ætlanin veruliga at satsa uppá Evropa. Teir hava sum mál at blíva ein av heimsins førandi bilaverksmiðjum.

### Størri og rúmligari

Hyundai Elantra er nógv betraður og nútímansgjørdur í mun til forgangarin, og verður hesin gjørdur sum 4/h sedan og 5/h hatchback. Bilurin er størri og rúmligari enn áður, og er nú í somu støðd sum t.d. Nissan Primera, Mazda 626 og Opel Vectra, sum ætlanin er at hann skal kappast við. Byrjunarhugskotið var at geva bilinum eitt nútímans og klassiskt design, við framtíðini í huga, og ein bil sum kundarnir um allan heimin fóru at taka væl ímóti.

### Aircondition standard

Í menningini av nýggja Elantra, hevur nógv verið gjørt burturúr innrættingini av bilinum, bæði sum familjubilur, og sum firmabilur, tá hann verður brúktur sum dagligt arbeiðspláss. Setrini eru nýggj og eru ergonomiskt rætt formaði, og geva góðan stuðul undir koyring. Instrumentini eru løtt at avlesa og funktionel. Aircondition er standard útgerð í øllum útgávunum.

### Tvær motorstøddir

Elantra fæst vi tveimum motorstøddum – annar er ein 1.6 litur við 107 hk, og hin er ein 2.0 litur við 141 hk. Felags fyri báðir motorarnir er at teir larma lítið og eru sera orkusparandi og umhvørvisvinarligir.

Bilurin er sera væl útgjørdur, og næstan alt er standard, hann hevur til dømis: 4 airbags, ABS bremsur við EBD, elektroniska startsperru, el-síðurútar framman og aftan og sentrallás, umframt nógva aðra útgerð.

**Hyundai Elantra 2.0 GLS 4/h**

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2.0 litur 16V 141 hk |
| 0-100 km/t: | 9.1 sek. |
| Bensinnýtsla: | 12,5 km/l |
| Dekkstødd: | 185/65-15 |
| **Stødd og vekt** | |
| Longd | 449,5 cm |
| Breidd | 172,0 cm |
| Hædd | 142,5 cm |
| Eginvekt | 1250 kg |
| Totalvekt | 1800 kg |
| Viðførisrúm: | 415 litrar |
| Prísur: | 2.0 GLS kr. 179.750 (1.6 GL frá kr.161.750) |
| Søluumboð: | Nordbil v/Oyggjarvegin FO-100 Tórshavn Tlf. 313707 |




*Nýggi Hyundai Elantra er sera væl útgjørdur og næstan alt er standard, hann hevur til dømis: 4 airbags, ABS bremsur við EBD, elektroniska startsperru, el-síðurútar framman og aftan og sentrallás, umframt nógva aðra útgerð*




*Nordbil við Oyggjarvegin umboðar Hyundai í Føroyum*



VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til Kára Hansen

**Eivind Jacobsen Strendur**

Ætlaði ikki at svara aftur til grein hjá Kára Hansen keypmanni, men tá hann blandar P/F Strandamáling uppí, og heitur á fólk um ikki at keypa Strandamáling, av tí at hann ikki dámar mín persón, havi eg avgjørt at svara aftur. Hetta svar verður eisini á hansara egna lága støði, sum annars átti at verðið uttan fyri tað, sum vanlig fólk seta sítt navn undir. Hetta verður gjørt út frá tí, at tað einasta sum slíkir persónar skilja er, tá teir verða settir upp á pláss. Eisini havi eg fingi áheitan frá fleiri strandingum um at svara aftur. Hetta svar hjálpir vónandi lesarunum at skilja, hví Kári Hansen ikki dámar undirritaða.

Kári Hansen heitur á fólk um at lata verða við at keypa máling frá P/F Strandamáling. Í dag eigi eg umleið 20% av partapeninginum í P/F Strandamáling og arbeiði annars ikki á virkinum, tó at eg gerði okkurt arbeiði fyri P/F Strandamáling. Tí vil eg meina, at mín persónur ikki eigur at blandast saman við P/F Strandamáling. Kári Hansen heldur ógvuliga lítið um meg, og tað skal hann sjálvandi hava loyvi til. Hetta verður ikki betri, tá kundarnir hjá Sp/f Hansen hava til fragd at standa í handlinum og rósa borgarstjóranum fyri »gott arbeiði«.

Satt at siga, hevði eg vænta, at okkurt tílikt sum hetta lesarabræv fór at koma. Slík herindi koma á Kára við jøvnum millumbilum. Serliga ger hetta seg galdandi, tá illa gongst í hond við handilsskapinum, og stress ger seg galdandi. Tá kemur andin yvir hann, og hann trívur í pennin. Møguliga er hetta við at henda í dag.

Vit minnast tá arbeiðsmannafelagið ikki vildi tekna partapening tá Kári skuldi keypa Roc Amadour. Tá fingu øll í arbeiðsmannafelagnum bræv, har Kári segði teimum, at formaðurin í Arbeiðsmannafelagnum ikki hevði uppfunnið tann djúpa talerkin. Eisini minnast vit, at ein persónur sum arbeiddi hjá honum bleiv uppsagdur. Samstundis sendi hann ALS bræv, har hann skrivaði at viðkomandi als ikki kundi brúkast til arbeiðis og als ikki tímdi at arbeiða. Úrslitið var, at viðkomandi fekk trupulleikar við ALS. Líknadi bræv er eisini sent til Føroya Banka.

Annars er Kári best kendur fyri ikki at gjalda rokningar. 13. november 1998 sóu vit á forsíðuni á Oyggjatíðindi, at hann skyldaði meir enn 300.000 krónur til Strandafaraskip Landsins. Men tá SL ikki tímur at koyra hann í rættin, sleppur hann undan at gjalda. Sum premiu samráðist Strandfaraskip Landsins við sama mann um at reka Skálafjarðarsiglingina.

Orsøkin til at Kári Hansen ikki dámar Eivind er, at Eivind ikki letur Kára, og heldur ongan annan, sleppa undan at gjalda sína skuld. Kári tolur ikki, at nakar setur hann upp á pláss, og tí fær man ein fígginda, um so verður gjørt. Tá als eingin vilji er til at finna eina loysn, verða eftirstøður sendar til sakførara. Tí havi eg hótt Kára við konkurs ella húsagangi nakrar ferðir. Soleiðis var Kári tríggjar tímar frá at verða uppsagdur í Langanesi. So komu pengarnir. Hansen Seafood fekk 5 daga freist, ella varð felagið koyrt konkurs. Tá komu pengarnir. Sp/F Grunningur havi eg havt í rættinum, og verður úttøka gjørd í nærmastu framtíð. Eisini eigi eg pant, sum dómur er fyri, í sethúsunum hjá Kára Hansen, og tá Kári ikki vil gjalda, hevur sakførarin fingið boð um at lýsa hús hansara á tvingsilssølu eftir vanligari mannagongd.

Kári finnur altíð pengarnar í seinastu løtu. So eini góð ráð til tykkum, sum eiga pengar til góðar hjá Kára Hansen eru at hótta við húsagangi. Tann sum rópar hart fær sínar pengar. Hetta er ikki populert, men hví ikki krevja sínar pengar, heldur enn at lata Kára Hansen spæla kong gularót við okkara pengum.

Eg ætli mær als ikki at svara nøkrum at pástandunum hjá Kára Hansen ella at kjakast við hann. Lesarin kann sjálvur gera sær sína meting.

# Irak - Kurdistan

Í juli 1996 varð tann 26-ára gamla Kajal Khidr handtikin av 6 limum úr familjuni hjá manninum. Hetta hendi nærhendis býnum Rania í irakiska Kurdistan.

Tey løgdu hana undir ótrúskap, hóast hon var við barn, píndu og løstaðu hana. Tey skóru eitt petti av nøsini og søgdu henni, at hon fór at verða dripin, tá barnið var føtt.

Aftaná viðgerð á sjúkrahúsi í Rania, megnaði hon at flýggja og fekk viðgerð í 3 mánaðir afturat á einum sjúkrahúsi í býnum Sulimaniya, har hon var vard av løgregluni. Síðani goymdi hon seg í eitt ár, áðrenn hon fann verju í einum kvinnuvarðhaldi í Sulamaniya.

Tað eydnaðist Kajal Khidr at flýggja til Sýria í februar 1999, tí hon fekk hjálp frá mannarættindaatgerðarfólki á staðnum. Hon varð hildin fyri at vera ein flóttakvinna úr United Nations High Commissioner fyri flóttafólk.

Í juli 2000 búsetti hon seg aftur í einum triðja landi, har hon nú býr saman við dóttir sínari, sum í dag er 4-ára gomul.

Tveir av monnunum, sum píndu Kajal Khidr, vórðu tiknir av myndugleikunum í umráðnum, sum er undir eftirliti av Patriotic Union of Kurdistan (PUK), men vórðu latnir leysir innan 24 tímar vóru farnir, tí tað varð hildið fast við, at teir høvdu gjørt hetta fyri at verja familjuheiðurin. Teir verða ongantíð ákærdir.

Á hvørjum ári, allastaðni í verðini, verða gentur og kvinnur álopnar og dripnar – vanliga av limum í teirra egnu familjum – vegna »heiðurin«. Tær verða skuldsettar fyri at gera familjuni og samfelagnum fyri skommum við teirra atburði. Hetta er frá bert at tosa við ein granna til at hava sexuelt samband uttanfyri hjúnarlag.

Kvinnur, sum eru mistonktar, hava ongan møguleika at verja seg og menn eru eggjaðir til at taka burtur »skommina« á teirra æru við at loypa á kvinnuna.

# Skrá í tólv tættum til forðing fyri píning

Píning er grundleggjandi brot móti mannarættindum og er bannlýst av aðalfundi sameindu tjóða sum brot móti menniskjavirðum, einsvæl og bannað sambært tjóðarrætti og altjóða lóg.

Hóast hetta, vera menniskju dagliga pínd um allan heimin. Amnesty International hevur tær royndir, at ikki er nóg mikið við lógarbanni. Neyðugt er beinanvegin at fara í stríð móti píning og aðrari grimari, ómenniskjansligari og niðrandi viðferð ella revsing, sama hvar tær verða framdar, til tess at útrudda tey fullkomiliga.

Amnesty International heitir á allar stjórnir um at seta hesa skránna í verk til tess at útrudda píning. Áhugaðir einstaklingar og felagsskapir verða bodnir við at fremja ætlanina. Amnesty International heldur, at verður hendan skráin sett í verk, ber tað boð um, at stjórnirnar eru sinnaðar at taka av píning og at virka fyri at hetta verður gjørt um allan heimin.

1. Almenn avsøgn av píning

Ovastu myndugleikarnir í øllum londum eiga at sýna teirra fullu andstøðu móti píning. Teir eiga at gera øllum embætisfólkum, ið hava til starv at halda lóggávuna uppi, greitt, at píning verður ikki told undir nøkrum umstøðum.

2. Avmarking av fongsling í avbyrging

Fólk verða ofta pínd, meðan tey sita avbyrgd í varðhaldi, og ikki fáa sett seg í samband við nakran uttanfyri at fáa hjálp ella fáa at vita, hvat fer at henda teimum. Stjórnirnar eiga at skapa trygd fyri, at tílík avbyrging ikki gevur møguleika fyri, at fangar verða píndir. Tað er av størsta týdningi, at allir fangar verða settir fyri ein dómara beinanvegin eftir, at teir eru handtiknir, og at skyldfólk, sakførarar og læknar uttan drál fáa regluliga atgongd til teirra.

3.Eingi loynilig fongsul

Í summum londum verða fólk pínd í loyniligum varðhaldum eftir at tey eru »horvin«. Stjórnirnar eiga at tryggja, at fangar verða havdir í alment viðurkendum støðum, og at sannar upplýsingar verða givnar skyldfólki og sakførarum teirra.

4. Trygdartiltøk undir avhoyring og í varðhaldi

Stjórnirnar eiga regluliga at endurskoða mannagongdirnar fyri varðhaldi og avhoyringum. Allir fangar eiga beinanvegin at fáa at vita, hvørji rættindi teir hava, heruppií eisini rætt til at klaga um ta viðferð, teir fáa. Regluligt eftirlit av óheftum eftirlitsfólkum eigur at vera við varðhaldsstøðum. Ein týdningarmikil trygd móti píning er, at teir myndugleikar, ið hava ábyrgdina av varðhaldi og avhoyringum, eru sínámillum óheftir.

5. Óheftar kanningar av frágreiðingum um píning

Stjórnirnar eiga at tryggja, at allar klagur og frágreiðingar um píning verða gjølla kannaðar av óheftum fólki. Kanningarháttur og úrslit eiga at verða kunngjørd. Tey, ið klaga, eins og vitni eiga at verða vard móti yvirgangi.

6. Frágreiðingar, givnar undir píning, mega ikki verða brúktar

Stjórnirnar eiga at tryggja, at játtanir um at vera sekur ella onnur prógv, fingin til vega undir píning, ongantíð verða brúkt í rættarmálum.

7. Píning eigur at verða bannað við lóg

Stjórnirnar eiga at tryggja, at píning er revsiverd sambært revsilógini. Sambært altjóðarætti má bann móti píning ikki verða sett úr gildi undir nøkrum umstøðum, eiheldur í krígstíð ella í undantaksstøðu.

8. Tey, ið hava gjørt seg sek í píning, eiga at verða revsað

Tey, ið hava framt píning, eiga at verða rættarsøkt. Hendan grundreglan eigur at verða fylgd, sama hvar brotsverkið varð framt og sama hvønn tjóðskap brotsmaðurin ella ofrið hava. Tað eigur ikki at finnast nakar griðstaður fyri tílíkar brotsmenn.

9. Útbúgving

At píning er brotsverk eigur at vera ein partur av upplæringini av øllum embætisfólkum, ið hava við varðhald, avhoyring og viðgerð av fangum at gera. Tey eiga at fáa at vita, at tey hava skyldu til at sýta fyri at líða boð um at pína fangarnar.

10. Endurgjald og uppreising

Offur fyri píning og teirra avvarðandi eiga at hava rætt til endurgjald. Ofrini eiga at fáa læknahjálp og uppreising

11. Altjóða tiltøk

Stjórnirnar eiga at sýta fyri øllum sambandi við stjórnir, ið nýta píning, ið kann tulkast sum at borið verður í bøtuflaka fyri teimum. Altjóða mannagongdir eiga at verða skipaðar og brúktar til bráðfeingis kanning av skuldsetingum um píning og munagóð fyribyrgingartiltøk. Stjórnirnar eiga at tryggja sær, at veiting av hernaðar-, trygdar- ella løgregluhjálp ella upplæring til onnur lond ikki kann medvirka til at píning verður framd.

12. Staðfesting av altjóða sáttmálum

Allar stjórnir eiga at staðfesta sáttmálar, ið fremja trygd móti og fyribyrging fyri píning, heruppií Altjóða semingin um borgaralig og stjórnmálalig rættindi og Valfrælsa gerðaskjalið til semingin, ið hevur reglur um einstaklinga kærurætt.

SCALEO TELDA
- við 1GHz prosessara

Scaleo Miditower, ið hevur m.a.: 128 Mb SDRAM, 20 Gb Harddisk, 32 Mb grafikk-kort, 12xDVD drev við software, floppydrev, 16 bit ljóðkort onboard, standard hátalarar, 56K internt DATA/FAX riser modem, Microsoft Windows MILLENIUM DK, Microsoft Works suite 2000, Microsoft Age of Empires II, standard tastatur, wheel mús, 17" skerm, 1 ára garanti

Kr. 14.795,-

3arin ELECTRONIC



FUJITSU COMPUTERS SIEMENS

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo